# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fólkaskúlin – røringur

Røringur er av álvara er komin í orðaskiftið um fólkaskúlan. Orðaskiftið, ið byrjaði her í blaðnum fyri stuttum snúi seg mest um bygnað og minni um innihald. Bygnaðurin hevur stóran týdning eitt nú tí hann hevur samband við fíggjarliga tilfeingið og fullnýtslu av allari skipanini: bygningum, útgerð og lærarakreftum. Ein av mongum fortreytum fyri innihaldsbroytingum er ein skilagóður og rationellur bygnaður, ein bygnaður, ið leggur upp fyri teimum sera stóru broytingum, ið eru hendar við okkara undirstøðukervi. Tað má vera ein skylda hjá avvarandi myndugleikum at innrætta skipanina soleiðis, at sum mest fakliga fæst burtur úr hesum broyttu fortreytum. Her skal hugsast um børnini eins nógv og um játtanina.

Nú er gongd komið á orðaskiftið, ið er ein fortreyt fyri einum skilagóðum úrsliti á hesum trupla máli. Málið er trupult, tí her eru so nógv fyrilit, so sterkar kenslur og so nógv lokal áhugamál í spæli. Eftir at hava hugsað seg um og kannað málið í nakrar dagar, er landsstýriskvinnan í skúlamálum, Helena Dam á Neystabø, komin til, at tíðin er búgvin at fara í holt við stórar og neyðugar bygnaðarbroytingar á fólkaskúlaøkinum. Landsstýriskvinnan er komin til ta niðurstøðu, at føroyski fólkaskúlin skal skipast í sjey skúlaøki. Hetta er so ein roynd at fáa gongd á eitt skúlapolitiskt trupult mál. Mentamálaráðharrin tykist at hava tulkað nýggju signalini frá Lærarafelagum rætt og at tíðin tískil nú er búgvin at fara til verka. Tað er jú royndur lutur, at er Lærarafelagið ímóti, so nyttar einum landsstýrismanni lítið at vera fyri. Men nú bendir sum sagt nógv, á at Lærarafelagið er til reiðar at kíka nakrar kamelar og tí er at smíða meðan jarnið er heitt. So er sjálvandi spurningurin, hvat kommunurnar siga og foreldrini halda um eitt so radikalt uppskot. Landsstýriskvinnan meldar gróthart út og sigur, at hetta mál kann ikki loysast sum eitt mál um økismenning men bert við atliti at endamálinum við føroyska fólkaskúlanum. Skipanin eigur at verða smíðað við atliti til barnið, og fakligu og menniskjansligu menning barnsins. Hesum kunnu vónandi allir lærarar og øll foreldur taka undir við.

Ítøkiliga merkir hetta, at eydnast tað ABC samgonguni at semjast um at skipa fólkaskúlan í sjey skúlaøki, so skal fíggjarorkan, sum verður leysgivin, brúkast til at bøta um viðurskiftini í fólkaskúlanum. Við at skipa landið í eitt nú sjey skúlaøki kunnu vit gagnnýta lærararorkuna og hølisumstøðurnar betri. Vit høvdu skapt møguleikar fyri fjølbroyttum undirvísingartilboðum og næmingalagaðari frálæru í økinum, og tann so nógv umrødda tvílæraraskipanin í teimum fyrstu flokkunum kundi verið eitt réelt tilboð, segði landsstýriskvinnan við Sosialin fríggjadagin í farnu viku. So er bert eftir at fara til verka á politiska vígvøllinum og spennandi verður, hvørja lagnu hetta týndingarmikla mál fær. Tað er sjálvandi óvíst, hvussu hetta mál endar. Hinvegin eru nú orð sett á ein megintrupulleika, so vónandi kemur okkurt gott burturúr.

**Sosialurin**

## Rættleiðing til John Johannesen

**HERGEIR NIELSEN**



John Johannesen er enn eina ferð úti við søguni um, at Javnaðarflokkurin sum einasti flokkur hevur noktað fyri, at USA í stríð við viljan hjá ST skuldi brúka føroyskt loftrúm í sambandi við náðileyst álop á Irak.

John Johannesen vísir á, at Andrias Petersen, ikki tók undir við, at loyvið hjá amerikanskum stríðsflogførum verður givið treytaleyst, men mælti til, at málið um álop á Irak fyrst skuldi roynast í ST høpi.

Tað er rætt, at Andreas Petersen orðaði seg soleiðis, men at Javnaðarflokkurin var einasti flokkur, ið mótmælti nýtslu av føroyskum loftrúmi til slíkt endamál, er tann reini heilaspuni.

John Johannesen vísir síðani á, at støðan hjá Hergeiri Nielsen og harvið Tjóðveldisflokkinum til álvarsmálið var ongin.

Hesi tíðindi hansara eru tíbetur ikki nær í námind av veruleikanum.

Í brævinum frá mær til løgmann um hesi viðurskifti stóð ma. soleiðis: "*Ein minniluti Hergeir Nielsen vísir á, at soleiðis sum málið er lýst, fáa vit føroyingar einki innlit í tey átøk, ið ætlast at fara fram í føroyskum loftrúmi.*

*Upplýst verður, at talan verður um flúgving við vandamiklum góðsi, og í hesum sambandi er eingin tilbúgvingarskipan tøk, um nakar vandi skuldi tikið seg upp.*

*Vísandi til løgtingssamtyktirnar um uttanveltaðu støðu Føroya og til almennu ætlan Føroya um at tryggja sær fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál, ið kunnu hugsast at hava týdning fyri Føroyar og føringar heldur minnilutin, at málið ikki er búgvið at taka støðu til.*

*Minnilutin mælir løgmanni til sum skjótast at tryggja okkum fult innlit í og avgerðarrætt á øll uttanríkis- og verjupolitisk mál eftir greiðum reglum og harafturat at taka almennu støðu Føroya sum partur av vesturheiminum og sum partur av Nato upp til viðgerðar beinanvegin*."

Spell, at John Johannesen enn eina ferð varpar út, at eg onga støðu hevði í hesum máli.

Hví hann timir at fara út við eini snaring av hesum viðurskiftum, sum eru almenninginum tøk á heimasíðu tingsins, skilji eg ikki.

Í fleiri umførum havi eg eisini í uttanlandsnevndini mótmælt flutningi av fangum í føroyskum loftrúmi.

Gunatanamolegan verður nú afturlatin, og longu nú síggjast í fjølmiðlunum fangar og fangavørðar teirra saman siga frá ræðuleikunum, har hava verið.

Har fangar vóru píndir til at viðganga brotsverk, teir ikki høvdu gjørt, og síðani vóru avrættaðir uttan rættargang.

Vit sleppa ongantíð undan ábyrgdini av, at flutningur av hesum fangum eisini fór fram í lofthavinum yvir Norðurhøvum, og eiga tí framhaldandi at stríðast fyri, at tað lofthavið, vit varða av, ikki verður misbrúkt til tílík endamál aftur.

Famjinsskjalið, sum tann samgongan setti sítt álit á, gav púrt einki innlit í hesi viðurskifti, og fara vit í Tjóðveldi tí framvegis at mæla til at taka hesi og onnur føroysk viðurskifti á føroyskar hendur.

## Stakir uppihaldarar hægri lestrarstuðul

**EYÐGUNN SAMUELSEN**
løgtingskvinna



Tað er ein sannroynd, at stakir uppihaldarar eru ein bólkur í okkara samfelag, ið hevur tað tungt fíggjarliga. Tey skulu fáa eina inntøku at røkka til útreiðslur, ið vit vanliga rokna við, at tvær inntøkur skulu til. Samstundis vita vit, at ein útbúgving er at rokna sum eitt atgongumerki til betur fíggjarkor. Tí er tað ein góð íløga og hjálp til sjálvhjálp at gera møguleikarnar hjá støkum uppihaldarum, at nema sær útbúgving, betur enn tær eru í dag.

Javnaðarflokkurin raðfestir henda bólkin frammaliga. Tí vóru vit við til at seta í verk barnastuðul til lesandi við børnum. Soleiðis at hesi fingu 600 kr. um mánaðin pr. barn í eykastuðli. Eisini settu vit, síðsta heyst í verk barnaískoyti til stakar uppihaldarar á 500 krónur um mánaðin. Henda upphædd verður í dag veitt til góð 800 børn.

Hóast stakir uppihaldarar, ið eru undir útbúgving, hava fingið nakrar batar seinastu árini, so er teirra støða framvegis ikki nøktandi. Serliga eru tað høgu bústaðarútreiðslurnar sum eru ein trupulleiki, tí eiga vit at økja lestrarstuðulin til henda bólkin. Tí sjálvt um lógin um lutaíbúðir er á veg í løgtingið, so verður bústaðartørvurin ikki loystur frá degi til dags.

Vit kunnu tó ikki, sum fíggjarstøðan er í dag, tvífalda stuðulin her og nú.

Danmark er einasta norðanlandið, ið letur dupultan lestrarstuðul til stakar uppihaldarar. Tí er freistandi hjá hesum bólki at fara til Danmarkar at nema sær útbúgving. Tað er onki galið í at fólk fara uttanlands at nema sær útbúgving, tá ið tey koma heimaftur geva tey okkum íblástur, og eru við til at flyta okkara samfelag fram á leið.

Tað er tó ikki rætt, um ein samfelagsbólkur verður noyddur av landinum, tí ongin møguleiki er í Føroyum fyri at bøta um síni livikor. Tí hava vit sett okkum sum mál miðvíst at økja lestrarstuðulin til stakar uppihaldarar við 1000 kr. frá 1. januar 2010 og aftur 1000 kr galdandi frá 1 januar 2011.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.